## Minningarorð um

# Jóhannes Eli Iversen

**f. 02.01-1948 d. 22.12-2006**

Nakrir tankar og minnir, nú svágur og bróður okkara so bráðliga varð tykin frá okkum.

Mær fyrikemur lívið sum ein urtagarð, har vit øll eru partur av, og har vit sum einstaklingar og familiur vaksa upp. Sjálvur vaks eg upp í einum lítlum garði í lívd av tveimum væl rótfestum trøðum, har vóru sera góð gróðrarlíkindi.

Men sum tíðin leið, byrjaði eg at hyggja meg um í tí stóra urtagarðinum, og har fekk eg eyga á eina vakra rósu, og tá ið eg so fór at ganga inn í urtagarðin, har sum rósan vaks, sá eg, at har vóru fleiri runnar og trøð, enn í tí garðinum har eg var vaksin upp, og tað eina lítla træið skaraði framúr í vakstrareginleikum, og sum árini eru farin, hava vit hvør í sínum lagi gjørt okkum okkara egna lítla urtagarð. Men tað vísti seg skjótt, at tað lítla træið sum skaraði framúr, tað bleiv til eina eik, sum vaks sera væl og skapti góð gróðrarlíkindi rundan um seg, og tá ið okkurt hvast æli kom, so leitaðu vit onnur okkum eisini lívd av eikitrænum,.



Men ein vakran summardag í árinum sum fór, fingu vit bráðliga boð um at bløðini fullu av tí sterka eikitrænum, og vit hugsaðu, at eikitræið var so sterkt, at tað fór skjótt at blóma aftur, men sum summarið leið, og heysti kom, vísti tað seg at eikin misti enn fleiri bløð, og ein kaldan dag stutt fyri jól, meðan vit onnur stákaust uppá tað mesta við at hugna um, og gera klárt til tað stóru hátíðina, komu boðini. Tann sterka eikin var følnað.

Og nú standa vit spyrjandi, tað er vorðið eitt stórt opið pláss í miðjuni, og tey trøini sum vuksu tættast við eikina, har hanga greinanar so tungar at tær eru við at brotna, og vit onnur spyrja? Hvørjum skulu vit nú standa í lívd av, tað følist sum at vindurin er so tráður, tann sterka eikin sum vit leitaðu okkum lívd av er burtur.

Men tað gongur aftur ímóti vári, og um vit standa saman og skapa lívd fyri hvørjum øðrum, so kanska fer at grønka einaferð aftur. Men plássið í miðuni verður verandi tómt.

**Helgi**

---

Nú ið bróður mín, Jóhannes Eli so brádliga varð tykin frá okkum, hava tankarnir mangan leitað til árðini, sum farin eru. Vit fimm syskini vuksu upp í Kvívík, har heimið við mammu og pápa var miðpunktið í tilverðuni. Og at vit sum børn spældu á helluni og niðri í fjøruni. Og hvussu tað longu tá kom til sjóndar, at Jóhs. Eli hevði evnir til at leiða og skapa. Eg hugsi um bilar og bátar, sum blivu evnað til í kjallaranum, bert við teimum fáu amboðum í tá vóru við hondina, og at tað altíð var Jóhs. Eli, sum var tann, ið tók sær av at smíða, sjálvt um hann var tann í vær ringast fyri, við einari brekaðari vinstru hond, og eg minnist manga troygguna, sum var skorin á hol á bringuni, tí hann ikki fekk hildið við vinstru hond. Og so árini í Havn, har vit húsaðust saman, og longu tá læt hann sær bát byggja. Eg minnist, hvussu stolt vit øll vóru av Jóhs. Eli, tá ið báturin var flotaður. Og so tá ið vit sjálvi høvdu fingið tak yvir høvdið, at Jóhs. Eli smíðaði sær sjálvum kamar uppi á loftinum, sjált um eingin trappa var uppá loft tað fyrstu tíðina, og tá ið læraraúbúgvingin var frá hondini og hann hevði fingið starv í Komunuskúlanum, syrgdi fyri at fáa grundstykki til vega, og fór í gongd við at byggja síni egnu hús. Og tá ið Asta og Jóhs. Eli giftust, kundu halda brúðleyp í teirra egna heimi. Og nú tey seinastu árini keypti sær sera snøggan hálvlidnan glastrevjabát, og so sjálvur gjørdi lidnan, og eydnaðist tað sera væl. „Antares“ er prógv um ein sera snøggan handverkara, sjálvt um Jóhs. Eli bert hevði lítið meir enn eina hond.

At lívið var so stokkut, høvdu vit ikki hugsað, Jóhs Eli, og vit onnur væntaðu at nú komu nøkur ár, har vit kundu njóta tilveruna, góðveðursdagar framm við landi. Men tað vildi hann í øllum valdar ikki.

Eg hugsi um, hvussu væl í alt var fyrireikað og lagt til rættist alt lívið. Og ikki minni nú teir seinastu dagarnar hann var okkara millum, hvussu grundiga hann fyrireikaði sína egnu fráferð.

Bøn okkara er, at Harrin má vera hjá tykkum, ið eftir sita, og geva tykkum styrki til at bera sorgina.

*Tá ið tey, vit elska her,*
*Harrin heim til hvíldar ber,*
*Tómligt kennist uttan tey,*
*gleðin mangan tikist deyð;*
*bert ein lítil stund tað er –*
*-Jesus kemur aftur her.*

Friður veri við minninum um sváð og bróður okkara

**Ívun**

# Erling Bech 60 ár

Leygardagin 10. mars fyllir Erling Bech í Havn 60 ár.

Erling er ættaður úr Vági. Sum 16 ára gamal flutti hann til Havnar at læra til møbilsnikkara hjá Verlandi Johansen.

Foreldrini hjá Erlingi vóru Maria og Poul Bech í Vági. Erling giftist við Ásu, f. Hansen, úr Havn. Tey eiga eiga fimm børn: Poul, Maria, Irena, Høgni og Helgi. Barnabørnini eru 8 í tali.

Síðan 1967 hevur familjan búð á Ternuryggi. Saman við familjuni hevur Erling síðan 1983 rikið handilin Ternubúðin. Handilin byrjaði í einum horni av kjallaranum, men í dag telist Ternubúðin millum teir størru handlarnar í býnum, og sonurin Høgni er leiðari á handlinum.

Erling er ein sera kreativur persónur. Hann er hjálpsamur og arbeiðssamur og hevur altíð góð hugskot. Hann er eisini ein dugnaligur handverkari og dámar væl at fáa avbjóðingar. Honum verður ynskt hjartaliga tillukku við føðingardegnum.

**Vinir**



†

## Andlát og jarðarferðir

**Åge Udbø úr Havn** andaðist á Hjørring Sjúkrahúsi 7. mars, 73 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju týsdagin 13. mars kl. 13. Sungið verður úr Sálmabókini.

**Dagmar Skarðhamar**, fødd Hansen, ættað úr Sandavági, andaðist í Keypmannahavn týsdagin 6. mars 97 ára gomul. Jarðarferðin verður frá Husum Vold kirke, leygardagin 10. mars klokkan 9.30.

Kistan við **Lisu Nattestad** fer úr Landssjúkrahúskapellinum leygardagin kl. 16. Jarðarferðin verður sunnudagin kl. 14 úr Miðvágs kirkju. Tey, ið vilja minnast Lisu, kunnu lata Miðvágs kirkju eina peningagávu, konta í peningastovnunum.

# Tøkk

Øllum tykkum, sum sýndu okkum samkenslu,
tá ið kæri maður mín, góði pápi, beiggi, versonur,
verfaðir og svágur okkara

**Jóhannes Eli Iversen**

var tikin frá okkum, takka vit hjartaliga.
Eina hjartans tøkk til tykkum øll, sum vitjaðu hann
undir sjúkraleguni bæði niðri og heima.
Tøkk til tykkum, ið hjálptu okkum við jarðarferðini,
og somuleiðis tøkk fyri troystarrík orð í kapellinum
og í kirkjuni.
Eisini takka vit tónleikarum og sangarum,
ið gjørdu løtuna í kirkjuni serstaka.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til
Hoyvíkar kirkju.
Øllum tykkum, ið fylgdu Jóhannes Eli til hansara
síðsta hvíldarstað, takka vit hjartaliga

**Asta, Bent Levi og Elsebeth**

**Dagurin**

**10. mars. Eðla.** Einki halgimenni er við hesum navni, men sipað verður kanska til enska abbadissu Sanktu Etelredu, sum doyði 10. mars í 626. Helst týska navnið Adelheid, hin ediliga.

**11. mars. Thala.** Ókend ung genta, sum tíðliga í fornkirkjuni varð tikin av døgum fyri trúgv sína.

**12. mars. Grækarismessa.** Til minnis um tann tiktikna pávan, sum fekk navnið Gregorius hin Mikli. Hann doyði 12. marts ár 604. Grækarismessa er ein av teimum døgunum, sum boða várið. Um hetta mundið kemur flytifuglurin tjaldrið aftur, og av mongum verður grækarismessa eisini rópt tjaldursdagurin. Grækarismessuhald at fagna tjaldrinum er íkomið í nýggjari tíð.

**60 ár**

Rasmus Skorheim bleiv 60 ár 5. mars. Dagurin verður hildin hjá døttrini á Eiði, »Úti á bø 86«, leygardagin 10. mars kl. 19.00.